# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*e-postur: anna@sosialurin.fo*

## 130 ára gamal metseljari

Meir enn 130 ár eftir at hann doyði, liggur franski høvundurin Alexandre Dumas, hann sum skrivaði Teir tríggir *Musketerarnir*, ovast á metseljaralistum við "spildurnýggjari" skaldsøgu.

Tað var Dumas-granskarin Claude Schopp, sum av tilvild fekk frænir av, at Dumas var í ferð við at skrivað handritið til eina skaldsøgu, tá hann doyði í 1870. Handritið til bókina *Le chevalier de Saint-Hermine* er ongantíð útgivið fyrr, men partar av tí stóðu at lesa sum framhaldssøga í einum fronskum blað um tað mundi - tó uttan at nakar visti, at hetta var byrjanin til eina skaldsøgu.

*Le chevalier de Saint-Hermine* er eitt klassiskt Dumas ævintýr, sum ferð fram í Fraklandi fyrstu árini undir Napoleon. Eitt av hæddarpunktunum er ein blóðug lýsing av slagnum við Trafalgar, har lesarin millum annað fær at vita, hvør, sambært Dumas, veruliga skjeyt admiral Nelson. At søgan í ávísan mun er ein sjálvævisøga tykist lítil ivi vera um. Pápi Dumas var nevnliga ein av rivalunum hjá Napoleon, og søgan lýsir ein ungan mann, sum hevnir pápa sín, sum er vorðin vanærdur av einum krígssinnaðum einaræðisharra.

Nýggja Dumas verkið hevur fingið framúr góð ummæli. Tað er heldur ikki á hvørjum degi, at bókaelskarar fá eina fyrstu útgávu av einum stórmenni innan franskar bókmentir í hondina.




# Harry Potter í stjørnukríggi

**Sætta bókin um Harry Potter hevur longu sligið síni egnu met. Næstan sjey milliónir eintøk fóru yvirum handilsdiskin í USA fyrstu 24 tímarnar. Í New York Times samanber ummælarin Harry Potter við ikki minni kenda Luke Skywalker frá Star Wars**

*Ingrid Bjarnastein*




*Ummælarar eru ikki á einum málið um, hvussu væl J.K. Rowling megnar at rúnarbinda sínar lesarar hesu fer.*

Gandakallurin, ið nøkur elska, og onnur elska at hata, er aftur. Sætta bókin um Harry Potter kom út fyri eini viku síðani. Mestsum allur bókaheimurin var á gosi, dagarnar áðrenn *Harry Potter and the Halfblooded Prince* skuldi verða útgivin. Bókhandlar kring allan heim høvdu opið út á náttina fyri at kunna geva forvitnum lesarum eitt eintak av bókini. Og ikki heilt óvæntað, seldi bókin 6,9 milliónir eintøk bert tann fyrsta dagin - og bara í USA. Til samanberingar seldi fimta bókin *Harry Potter og Føniksfylkingin* "bara" fimm milliónir eintøk eftir somu tíð.

### Loyniligt

Sjáldan verður gjørt so nógv burturúr eini bókaútgávu, og eisini fingu bókhandlar strong boð um, ikki so mikið sum at vísa húsan á bókini fram í sjónvarpinum ella aðrastaðni áðrenn sjálvan útgávudagin. Sjálvt ikki eskjurnar kundu standa frammi í handlinum.

Men hví verður alt hetta hóvastákið gjørt burturúr? Bókin fær um dagarnar blandað ummæli frá ummælarum kring heimin.

Politiken heldur, at J.K. Rowling hevur sum rithøvundur gjørt eitt betri arbeiði enn í undanfarnu bókunum. Ummælarin hjá New York Times heldur somuleiðis, at bókin inniheldur eitt frálíkt samanspæl millum teir ymisku persónarnar. NYT vil eisini vera við, at Harry Potter kann samanberast við Luke Skywalker, og at brot av søgugongdini eisini kunnu síggjast aftur í Star Wars filmum.

Eisini í Berlingske Tidende fáa Potter og hansara fólk framúr viðmæli. Kari Sønsthagen gevur bókini fimm út av seks møguligum stjørnum.

### Heimsskaldskapur

Fyri at venda aftur til ummælið í New York Times, samanber ummælarin Potter-bøkurnar við stóran heimsskaldskap, sum til dømis *Ringanna Harri* hjá J.R.R Tolkien. Ikki kann sigast annað enn, at tað eru stór orð at fáa við á vegnum.

Jyllands-Posten ber hinvegin ikki bert rósandi orð til bókina. "Tað slepst ikki undan, at nakað av tómgongd er í bókini... Men hóast tað, kann ein gleðast yvir smittandi forteljigleðina hjá Rowling..." skrivar Jyllands-Posten.

Hvussu er ella ikki, so megnar Rowling at rúnarbinda fleiri milliónir lesarar í fleiri tímar við sínum gandakynstrum. Hon vekir innara barnið í flestu vaksnum fólkum og minnir okkum á, at vit øll viðhvørt hava brúk fyri at flýggja inn í ein ókendan heim. Ein heim, har hon við gávumildari hond stroyir við skemtiligum hendingum, álvarsmálum, myrkri og einum hugflogi, ið fer hægri upp enn hjá teimum flestu. Og samanlagt verður hetta til ein fantastiskan cocktail, ið inniheldur allar tær røttu eindirnar, ið skapa spennandi og hugtakandi bøkur.

## Metseljarar í donskum bókabúðum:

**Fagrar bókmentir:**

1. Dan Brown, *Da Vinci mysteriet*
2. Dan Brown, *Engle og dæmoner*
3. Boisen/Stockman, *Michael Laudrups tænder*
4. Christian Jungersen, *Undtagelsen*
5. Sara Blædel, *Kald mig prinsesse*
6. Lind/Thorsen, *Nynnes dagbog 2*
7. Morten Ramsland, *Hundehoved*
8. Camilla Stockman, *Nyforelskelse og andre cykelstyrt*
9. Maria Helleberg, *Den hellige Knud*
10. Paul Auster, *Brooklyn Dårskab*

**Yrkisbókmentir:**

1. Boisen/Stockman, *Michael Laudrups tænder*
2. Michael Baigent et. Al., *Helligt blod, hellig gral*
3. Michael Jeppesen, *Før ørerne falder af*
4. Erik Bolie, *Politikens Handyman*
5. Tor Nørretranders, *Menneskeføde*
6. Sofia Manning, *Coaching*
7. Mireilli Guiliano, *Franske kvinder bliver ikke fede*
8. Lucy Knox, *Sommerfristelser på webergrillen*
9. Lene Hansson, *Du er hvad du spiser*
10. Sissel-Jo Gazan, *Sig ja!*

**Endurminningar:**

1. B.S. Christiansen, *Et liv på kanten*
2. Annelise Bistrup, *Margrethe*
3. Herbert Pundik, *Det er ikke nok at overleve*
4. Lars Werge, *Drømmeholdet*
5. Erik Brandt, *Brandt*
6. Stig Ørskov et.al, *Mærsk - manden og magten*
7. Preben Wilhjelm, *Fra min tid*
8. Bill Clinton, *Mit liv*
9. Fersmark/Tejlman, *Maria*
10. Paul Dahl, *Jægersoldat i en terrortid*

*Kelda: www.gad.dk, 22.07.05*

## Irving bólgnar

John Irving fjepparar hava nú fingið lesitilfar til restina av summarfrítíðini. Seinasta bókin hjá John Irving kom út í síðstu viku, og er hon enn rúgvusmiklari, enn bøkurnar hjá Irving annars. 848 síður fyllir *Until I find you* um sjónleikarin Jack Burns, sum leitar eftor bæði sínum samleika og pápa sínum. Ferðin gongur ígjøgnum ein tatovør heim, gentu- og dreingjaskúlar umframt ymisk Hollywood umhvørvi. Bert eina viku eftir útgávuna liggur bókin sum nr. 13 á amerikanskum metseljaralistum.




**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**

Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo